

# Frágreiðing um Skúlaheimið í Marknagili og tilráðing



Arni Clementsen

Skúlaheimsleiðari

# Innihaldsyvirlit

## Lýsing av Skúlaheiminum


Innleiðing ........................................ 2

Starvsfólk ........................................ 3

Matarskipan ........................................ 3

Skúlaheimsrakstur ........................................ 4

Námsfrøðilig umsjón/frítíðarvirksemi ........................................ 4


## Samanumtøka, samanberingar og tilráðing um Skúlaheimið


*Er tørvur á skúlaheimi ella kollegie við námsfrøðiligari umsjón* ........ 5

- ***Tilráðing*** ........................................ 6

*Dagføring av Skúlaheiminum* ........................................ 6

- ***Tilráðing*** ........................................ 7

*Skúlaheimsraksturin* ........................................ 7

- ***Tilráðing***........................................ 8

*Viðlíkahald og reingerð* ........................................ 8

- ***Tilráðing*** ........................................ 8

*Framtíðin hjá verandi hølum – tá Skúladepilin er tikin í nýtslu* ....... 9

- ***Tilráðing*** ........................................ 9

*Eftirskrift* ........................................ 10

Hjáløgd skjøl ........................................ 10

- Frágreiðingar frá skúlaheimsvitjanum í Danmark
- Kostnaðarmeting av dagføring av Skúlaheiminum

# Lýsing av Skúlaheiminum

## Innleiðing

Leiðslubólkurin á Tekniska Skúla hevur javnan umrøtt Skúlaheimið, og hvør framtíðin hjá skúlaheiminum verður, tá nýggi skúlin í Marknagili verður veruleiki.
Á leiðslufundi varð samtykt, at undirritaði, sum liður í menningini av Skúlaheiminum, skuldi vitja nøkur skúlaheim í Danmark. Hetta var ein av niðurstøðunum, sum var felt í niðurstøðuskjalið frá trivnaðar- og menningarfundinum 9. febr. 2012.
Eg setti meg í samband við trý skúlaheim í Danmark og gjørdi avtalur um at vitja.
Hesi skúlaheimini eru í Slagelse, Odense og Skive.
Frágreiðingarnar frá hesum vitjanum, sum eru aftast í hesi frágeiðing, er ætlað sum samanberingargrundarlag og íblástur til møguligar broytingar, sum kunnu setast í verk á Skúlaheiminum í Marknagili.



Skúlaheimið í Marknagili varð tikið í nýtslu í 1976. Skúlaheimið er í 4 hæddum, umframt kjallara. Á 1. hædd er forhøll, móttøka, skrivstova, starvsfólkarúm. Upprunaliga, tá skúlaheimið varð tikið í nýtslu, var íbúð hjá skúlaheimsleiðaranum og familju hansara í 1. hæddini. Í dag eru skrivstovur, fundarrúm, starvsfólkarúm og goymslurúm, har íbúðin var. Matstovan, sum kann rúma 250 fólk til borðs, er uppdeild í tvey rúm við skjótihurð. Úr matstovuni er gott útsýni yvir býin. Vælútgjørdi køkurin hevur góðan kapasitet at matgera til tey búgvandi og til tiltøk og stórar veitslur. Eisini ger køkurin mat og skundverðar út úr húsinum.

Í kjallarahæddini eru í dag tvær skúlastovur, umframt onnur minni tilhoyrandi rúm. Ein skúlastova er eisini á 1. hædd (sjónvarpsstovan). Tað eru yrkisakademiútbúgvingarnar, Byggitøkningur og Framleiðslutøkningur, sum hava undirvísingarhøli á Skúlaheiminum.
Á 2. hædd, 3. hædd og 4. hædd eru tilsamans 51 kømur. Í dag eru 47 kømur tøk til útleigan. Fýra kømur verða brúkt til onnur endamál.
Matstovan og tilhoyrandi høli hava seinastu árini verið útleigað til í miðal 2 tiltøk um mánaðin. Hetta er sum oftast í vikuskiftunum, har brúdleyp, veitslur, fundir, ervi og onnur tiltøk verða hildin á skúlaheiminum.
Matstovan verður eisini brúkt sum einasta hølið, har tekniski skúli kann savna allar ella partar av sínum næmingum til t. d. móttøku av nýggjum næmingum, fyrilestrar, skrivligar próvtøkur.

**Starvsfólk**

Á skúlaheiminum starvast skúlaheimsleiðari og kokkur fulla tíð. Í køkinum og við reingerð starvast seks fólk í ¾ tíðarstarvi. Eisini er húsavørður í ¾ tíðarstarvi. Afturat skúlaheiminum eru knýttir tveir lærarar, sum skiftast at hava náttarvakt hóskvøld.
Skúlaheimsleiðarin tekur ímóti bíleggingum av kømrum, tekur ímóti tá næmingarnir koma, innskrivar og ger leiguavtalu og avtalu um leigugjald. Skúlaheimsleiðarin hevur um hendi at kanna eftir, um húsaleigan er goldin og letur næmingunum kontoavrit. Skúlaheimsleiðarin hevur skrivliga samskiftið í sambandi við útleigan av hølum til tiltøk og avgreiðir allar rokningar í sambandi við útleigan og mat, sum verður latin út úr húsinum.

**Matarskipan**

Næmingarnir fáa allar máltíðir á Skúlaheiminum. Millum kl. 7 og 8 er morgunmatur, kl. 11.30 – 12.30 er døgurði, og kl. 17.30 -18.30 er náttúrði við viðskera og flógvum rætti. Kvøldkaffi stendur frammi frá kl. 20. Døgurðamatarskráin er ymisk og fjølbroytt hvørja viku, við fiski, frikadellum, kjøti, burgarum, og oftani er buffet við fleiri ymiskum rættum. Eisini er stór salatbuffet hvønn dag. Næmingar á skúlanum annars, starvsfólk og rættuliga fitt av fólki uttanífrá eta bæði døgurða og salat á middegi. Køkurin framleiður dagliga frá 100 – 250 døgurðar, valdast hvat matskráin er.



## Skúlaheimsraksturin

Skúlaheimið kann hýsa 47 næmingum í einakamari. Skúlaheimið hevur upprunaliga kunnað hýst 2 næmingum í hvørjum kamari, men í 2009 varð gingið burtur frá hesum, og í dag eru øll kømur einakømur. Næmingatalið broytist ógvuliga nógv ígjøgnum árið, av tí at skúlaskeiðini eru ymisk í longd, men ársnæmingatalið hevur ligið um 41 seinastu árini.
Raksturin av skúlaheiminum er sambært fíggjarætlan settur saman av almennum studningi, leigugjaldi frá næmingum og inntøkum frá køkinum og útleigan. Leigugjaldið hjá lærlingum og SIT-næmingum er kr. 710,- um vikuna ella kr. 2.840,- um mánaðin við fullum kosti og interneti. Næmingar, sum eru í hægri útbúgving gjalda kr. 2.500,- um mánaðin, men uttan døgurða. Rakstraræltanin fyri 2011 kann sundurgreinast soleiðis, at almenni studningurin er uml. 21 %, leigugjaldið hjá næmingunum er 19 %, og inntøkan frá køkinum og útleigan til tiltøk er 60 % av samlaðu fíggjarætlanini.
Almenni studningurin pr. ársnæming er uml. kr. 27.600,- í mun til taxameturstuðulin til skúlaheimini í Danmark, sum liggur um kr. 60.000,- pr. ársnæming.
Í fíggjarætlanini er onki sett av til námsfrøðiliga umsjón og frítíðarvirksemi, tó verður eitt sindur brúkt til náttarvakt eitt kvøld um vikuna.

## Námsfrøðilig umsjón/frítíðarvirksemi

Verulig námsfrøðilig umsjón er ikki á Skúlaheiminum, tó er tað so, at skúlaheimsleiðarin og náttarvaktirnir, í tann mun møgulleiki er fyri hesum, gera eitt sindur av hesum arbeiði. Tað eru vanliga skúlaheimsassistentar, sum eru á skúlaheiminum alt samdøgrið, sum hava námsfrøðiligu umsjónina og trivnaðin hjá næmingunum um hendi.
Námsfrøðilig umsjón gongur út uppá at skapa trivnað, vera næmingunum til hjálpar og stuðla teimum í skúlagongdini, hjálpa teimum við heimaarbeiði og skipa fyri ella eggja næmingunum til ymiskt virksemi og frítíðarítriv. Av øðrum uppgávum skulu skúlaheimsassistentarnir gera tað praktiska í samb. við aktivitetir, tilmelding, flutning o. a. Luttaka í fundum innan- og uttanhýsis í sambandi við Skúlaheimið. Skúlaheimsassitentarnir eiga at sita til borðs um kvøldið saman við næmingunum.
Serstøk høli til frítíðarvirksemi eru ikki á Skúlaheiminum. Borðtennis- og billiardborð eru sett upp í matarhøllini, og sjónvarp er í forhøllini. Annað virksemi t. d. at vísa film ella dystir á stórskíggja fyrigongur í matarhøllini. Tað er sostatt ikki møguligt hjá næmigunum at seta sín dám á hølini til virksemi og ítriv, sum síggjast á skúlaheimum, eg havi sæð aðrastaðni.

## Samanumtøka, samanberingar og tilráðing um Skúlaheimið

Niðanfyri eri nøkur øki, sum eg havi valt at taka samanum, gera nakrar samanberingar við tey skúlaheim, eg havi vitjað í Danmark og koma við tilráðingum.

***Er tørvur á skúlaheimi ella kollegie við námsfrøðiligari umsjón***

Í Danmark eru ávísar reglur um, nær næmingur kann fáa innivist á skúlaheimi. Frástøðan frá bústaði til skúlan skal vera minst 5 korter í almennari flutningsleið, og ongin skúli við somu útbúgving skal vera nærri. Tó eru undantøk, har sosialir myndugleikar eru uppií.
Her á Skúlaheiminum hava tær reglur ella siðvenjur verið galdandi, at næmingar uttan fyri Tórshavnar Kommunu hava rætt til at búgva á Skúlaheiminum. Eisini hevur siðvenjan við hvør kann búgva á skúlaheiminum verið henda:
1) næmingar/lærlingar á Tekniska Skúlanum.
2) næmingar á Vinnuháskúlanum (maskinmeistaraskúlanum)
3) Aðrir næmingar á handilsskúla ella studentaskúla
Flestu næmingar, sum búgva á Skúlaheiminum eru úr Suðuroynni, Sandoynni, Vágum og Norðuroyggjum. Fáir næmingar eru úr Norðurstreymoy og Eysturoynni.

Út frá, at miðal nýtslustigið um árið er uml. 41 av 47 møguligum, er tað avgjørt tørvur á einum skúlaheimi. Nú Skúladepilin, við 1200 næmingum, nærkast, verður eftirspurningurin eftir bústaði ivaleyst at vaksa.
Tankar hava verið frammi, um tað er betur hóskandi við einum kollegi. Vísast kann á, at teir næmingabústaðir í býnum, sum eru og hava verið riknir sum kollegie, hava stórar trupulleikar við at halda bygningarnar í nøktandi standi. Næmingaheimið í Børkugøtu er stongt/tvingilssølu. Næmingaheimið undir Fjalli hevur eisini sínar trupulleikar við stórum viðlíkahaldstørvi.
Mín meting er tann, at tað er vantandi umsjón, bæði námsfrøðilig og praktisk, sum ikki er til staðar, er størsta forðingin fyri, at eitt kollegie ella skúlaheim kann virka. Næmingarnir í hesum aldri hava ikki lætt við at búgva fyri seg sjálvar uttan umsjón.
Royndirnar frá teimum skúlaheimum, eg vitjaði í Danmark, vísa, at námsfrøðiliga umsjónin er tað, sum ger munin, um eitt skúlaheim ella kollegie virkar ella ikki (sí hjáløgdu frágreiðingar). Á skúlaheimunum, eg vitjaði, verður millum 15 % og 22 % av játtanini brúkt til námsfrøðiliga umsjón (lønir og virksemi).

***Tilráðing***

Skúlaheimið heldur fram eftir verandi leisti, men við manning hvørt gerandiskvøld. Verulig námsfrøðilig umsjón verður á Skúlaheiminum, sum greitt frá omanfyri og nevnt í frágreiðingunum frá vitjanum í Danmark. Skúlaheimið verður dagført, sum greitt verður frá niðanfyri.

***Dagføring av Skúlaheiminum***

Skúlaheimið, sum varð liðugt bygt í 1976 og umvælt mitt í 90 unum, tá vindeygu vórðu skift og útsíðurnar klæddar, er ikki umvælt innan í sama mun.









Tað treingir til høvuðsrenovering av øllum kømrunum, serliga eru tað wc- og baðirúmini, sum eru niðurslitin, eins og innbúgvið, sum er fra 1976, er nógv slitið. Eisini eru kømrini ikki í tráð við núgaldandi brunakrøv um veggir millum búrum og gangir.
Sambært metingum hjá Sp/f Fuglø Arkitektar, kostar tað tilsamans uml. 19 mill. at umvæla allar tríggjar kamarshæddirnar. Ella í meðal kr. 6,3 mill pr. hædd (Sí hjálagda kostnaðarætlan).
Mælt verður til, at Skúlaheimið verður umskipað og umbygt, so tað kann virka sum bæði skúlaheim og kollegie. Til umbygging av Skúlaheiminum eru tvær lógir, sum kunnu brúkast:

1) Sambært grein 3 í *Løgtingslóg nr. 63 frá 23. juni 1983 um bústaðarhús til fólk í útbúgving* kann landið veita stuðul upp til 65% av byggikostnaðinum ella keypsprísi og umbyggingarkostnaði í sambandi við 1) Bygging av nýggjum bústaðarhúsum, ella 2) Keyp og umbygging av verandi bygningum til bústaðarhús.
   Mælt verður til, at fíggingin verður 65% frá landinum, og restin verður stuðul frá kommununi (møg. kommununi, har næm. koma frá), og sjálvsognarstovnurin útvegar ein minni part.

2) Sambært § 11 stk. 3 í *Løgtingslóg nr. 106 frá 29. desember 1998 um yrkisskúlar, sum broytt við løgtingslóg nr. 156 frá 20. desember 2001* kann landið útvega stuðul til umbygging ella stuðul til rentur og avdrøg í samb. við umbygging av Skúlaheimi.

***<u>Tilráðing</u>***

Farið verður undir at renovera Skúlaheimið sum skjótast, so tað er klárt at taka ímóti nýggjum avbjóðingum, tá Skúladepilin er liðugur. Farast kann soleiðis fram, at ein hædd verður umvæld í senn, so restin av skúlaheiminum virkar, meðan arbeiðið verður gjørt.

***Skúlaheimsraksturin***

Rakstrarstuðulin til Skúlaheimið verður veittur sambært § 11 í *Løgtingslóg nr. 106 frá 29. desember 1998 um yrkisskúlar, sum broytt við løgtingslóg nr. 156 frá 20. desember 2001.*
Rakstrarstuðulin, sum hevur verið veittur seinastu árini, og serstakliga í 2012, hevur ikki verið nøktandi til, at Skúlaheimið kann liva upp til tað, sum eigur at vera endamálið hjá einum skúlaheimi:

- at vera bústaður hjá ungfólki undir tryggum umstøðum, har starvsfólk eru alt samdøgrið til at vera stuðul og hjálp hjá næmingum, sum kanska fyrstu ferð skulu búgva uttan fyri heimið. Nógvir av næmingunum eru 16 – 18 ára gamlir, tá teir fyrstu ferð koma á Skúlaheimið.
- at vera eitt heim, har næmingar trívast, mennast, og har tað eigur at vera rúm fyri, at starvsfólk eru tøk at hjálpa næmingunum við ymiskum t.d. heimaarbeiði, um teir hava tørv á tí.
- at eggja næmingunum til at luttaka í og sjálvir fyrireika mennandi virksemi á Skúlaheiminum eins væl og aðrastaðni í býnum.

Á teimum skúlaheimum í Danmark, vit kunnu gera samanberingar við (sí hjáløgdu frágreiðingarnar), verða 15 - 22% av rakstrarætlanini brúkt til námsfrøðiliga umsjón og annað virksemi á skúlaheiminum, næmingunum at gagni.

## *Tilráðing*

Út frá teimum tølum, sum eru nevnd omanfyri, er raksturin í stóran mun tengdur at virkseminum í køkinum og í minni mun tengdur at almenna rakstrarstuðlinum og leigugjaldinum. Leigugjaldið, sum er kr. 2.840,- um mánaðin, meti eg ikki kann setast hægri, tí so velja næmingar at búgva aðrastaðni. Nevnast kann, at á skúlaheimum í Danmark gjalda næmingarnir í mesta lagi kr. 1.920,- um mánaðin. Næmingar í Danmark undir 18 ár og næmingar við uppihaldsskyldu búgva ókeypis á skúlaheimum.

Neyðugt er tí, at almenni rakstrarstuðulin til Skúlaheimið verður øktur, so hann verður uml. kr. 2,5 mill. árliga, fyrst og fremst fyri at námsfrøðiliga umsjónin, økt reingerð og viðlíkahald kann verða á einum hóskandi støði.

Um tað verður so, at Skúlaheimið fær øktar inntøkur í sambandi við byggiarbeiðið í Marknagili, eigur hetta at fara til dagføringina, sum nevnt omanfyri.

## *Viðlíkahald og reingerð*

Í rakstrarætlanini hjá Skúlaheiminum er onki sett av til viðlíkahald av bygninginum. Til keyp av útbúnaði, maskinum, amboðum og umvæling av rakstrargøgnum er sett av kr. 150.000,- ella uml. 3%.
Næmingarnir gera sjálvir reint á kømrunum og tilhoyrandi wc og baðirúm. Reingerðarfólk gera gangir, trappur, skúlastovur, forhøll og matarhøll reint. Køkurin og øll rúm í sambandi við køkin/matgerðina verða reingjørd eftir ætlan, sum Heilsfrøðiliga Starvsstovan hevur góðkent.

## *Tilráðing*

Skúlaheimið, sum varð tikið í nýtslu í 1976, og lítið viðlíkahildið innan, treingir til dagligt viðlíkahald alla tíðina. Mælt verður til, at størri játtan verður til viðlíkahald, antin innan rakstrarjáttanina ella av játtanini til viðlíkahald av almennum bygningum, sum Landsverk umsitur.
Mælt verður til, at reingerðin verður broytt soleiðis, at reingerðarfólk, umframt tað omanfyrinevnda, reingera øll wc og baðirúm á Skúlaheiminum. Hetta tí at hesi rúm eru ógvuliga slitin og krevja serliga reingerð, so heilsuligur vandi ikki stendst av vantandi reingerð.
Annars vísi eg til tilráðingina um dagføring av Skúlaheiminum.

***Framtíðin hjá verandi hølum – tá Skúladepilin er tikin í nýtslu***

Tá Skúladepilin er tikin í nýtslu, verða nøkur viðurskifti hjá Skúlaheiminum munandi broytt. Verandi skúlastovur, sum hýsa yrkisakademiútbúgvingunum, verða tøkar. Hetta eru høli, sum fyrr vórðu nýtt av næmingunum, sum búðu á Skúlaheiminum.
Nýggi Skúladepilin hevur stóran framleiðslukøk, sum væl kann matgera heitan mat til næmingarnar á Skúlaheiminum.
Matarhøllin, sum kann sundurskiljast við skjótihurðum, verður óneyðuga stór til tann tørv, sum næmingarnir á Skúlaheiminum hava til morgunmat og nátturða.
Fundarhøli, skrivstovuhøli og goymslur/prentrúm verða eisini tøk.

***Tilráðing***

Mín tilráðing er, at sjálvsognarstovnurin Tekniski Skúlin í Tórshavn, heldur fram sum eigari av Skúlaheiminum og hevur sjálvstøðugan rakstur við neyðugum rakstrarstuðli, samb. § 11 í *Løgtingslóg nr. 106 frá 29. desember 1998 um yrkisskúlar, sum broytt við løgtingslóg nr. 156 frá 20. desember 2001.*

Møguliga eigur at umhugsast at samanleggja ella samskipa raksturin av Skúlaheiminum og Næmingaheiminum undir Fjalli. Eisini kann hugsast, at næmingar, sum búgva undir Fjalli, fáa boðið matarskipan.

Undirvísingarhølini í kjallaranum á Skúlaheiminum verða latin næmingunum til ymiskt frítíðarvirksemi t. d. billiard, borðtennis, fótbóltspøl, fitness o.a. Latið verður upp í hendurnar á næmingunum at innrætta og prýða hølini.

Hølini í stovuhæddini, skrivstovur, fundarrúm og undirvísingarhølið, saman við parti av matarhøllini kunnu innrættast og nýtast av Skeiðsdeplinum. Fyrisitingin av Skúlaheiminum og Skeiðsdeplinum kunnu samskipast.

Verandi køkur á Skúlaheiminum skal framvegis gera morgunmat og nátturða til næmingarnar og kann eisini lata mat, kaffi o. a. í sambandi við skeiðvirksemi.

**Eftirskrift**

Sambært avtalu millum sjálvsognarstovnin Tekniski Skúlin í Tórshavn, sum eigur Skúlaheimið og Mentamálaráðið, falla Skúlaheimið og ognir skúlans annars til Mentamálaráðið, tá Skúladepilin í Marknagili er tikin í nýtslu. Tað er tí ongantíð ov skjótt at fáa greiði á, hvussu framtíðarætlanirnar og ognarviðurskiftini hjá Skúlaheiminum verða í framtíðini.

**Hjáløgd skjøl**

Frágreiðing um Vitjan á Skúlaheiminum, Valbyvej 69, Slagelse.

Frágreiðing um Vitjan á Skúlaheiminum/Erhvervskollegiet, Kongsvingervej 1, Skive

Frágreiðing um Vitjan á Skúlaheiminum, Blangstedsgårdsvej 1b, Odense
(Munkeris Skolehjem og Kursushotel)

Kostnaðarmeting frá Fuglø Arkitektar av dagføring av Skúlaheiminum

## Vitjan á Skúlaheiminum, Valbyvej 69, Slagelse.

## Innleiðing

Avtalað varð, at eg skuldi koma at vitja 17. apríl, og var eg har á middegi.
Eg var móttikin av Per Christensen, skúlaheimsleiðara, eisini var Torben Sverre Jørgensen (skúlaheimsassistentur) til staðar.
Eg var saman við Per og Torben, har eg fekk eina rúgvu av upplýsingum og seinni um dagin/kvøldið var eg saman við øðrum skúlaheimsassistenti og næmingum. Skúlaheimið hýsir næmingum/lærlingum í einum eldri bygningi, sum er umbygdur og innrættaður við 1 mans og 2 mans kømrum. Kømrini eru ógvuliga ymisk til støddar.



Í einum nýggjum bygningi í 2 hæddum, sum er ætlaður skeiðsluttakarum, eru snotilig 1 mans kømur og tilhoyrandi uppihaldsrúm og tekøkar.

## Starvsfólk

Skúlaheimið er mannað alt samdøgrið. Í útgangsstøðinum er skúlaheimið stongt í vikuskiftunum, men eftir serligari avtalu búgva nakrir næmingar í vikuskiftunum. Hesir næmingar, ið hava samband við sosialu myndugleikarnar, matgera sjálvir í vikuskiftunum. Ein skúlaheimsleiðari er settur fulla tíð, harafturat eru fleiri skúlaheimsassistentar, sum skiftast at hava vakt frá kl. 15.30 til kl. 8.00 morgunin eftir. Í vikuskiftunum er tilkallivakt. Skúlaheimsleiðarin hevur eitt parttíðar skrivstovufólk. Skúlaheimið og deildin á Valbyvej (Kokke- og tjenerskolen, Mad til mennesker) hava somu skrivstovu og deilast um køksstarvsfólk, vaskifólk og húsavørðar.





## Matarskipan

Í matstovuni á skúlaheiminum verður morgunmatur serveraður frá kl. 7.30. Á middegi fáa skúlaheimsnæmingarnir heitan rætt og ¼ litur mjólk í kantinuni á deildini, har teir ganga. Skúlin hevur, umframt deildina á Valbyvej, fimm aðrar deildir ymsastaðni í býnum.
Um kvøldið, kl. 17.15 – 18.15, er nátturði. Nátturðin er flógvir rættir og viðskeri. Afturvið kvøldkaffinum er køka ella okkurt annað.
Døgurðin og teir flógvu rættirnir verða framleiddir í einum sentralkøki, sum allar deildir skúlans brúka. Maturin verður fluttur í termokassum.





## Skúlaheimsraksturin

Skúlaheimið kann hýsa 87 næmingum í gamla bygninginum og 20 í nýggja bygninginum (skeiðsdeildin), t.v.s. íalt 107 seingjarpláss. Í fíggjarætlanini er roknað við uml. 75 ársnæmingum (ársnæm. = 1 næm. í 40 vikur).
Skúlaheimið verður fíggjað við almennum studningi eftir taxameturprincippinum og leigugjaldi frá næmingum og skeiðsluttakarum.
Samlaði almenni stuðulin og leiguinntøkurnar eru pr. ársnæming uml. kr. 60.000,-.
Næmingagjaldið er kr. 480,- um vikuna. Skeiðsluttakarar gjalda nakað meira. Næmingar, sum eru undir 18 ár, búgva ókeypis. Næmingar, sum hava uppihaldsskyldu, búgva eisini ókeypis.
Tað, næmingar og skeiðsluttakarar gjalda, er uml. 3% av fíggjarætlanini.
Námsfrøðilig umsjón, t.v.s umsorgan fyri næmingunum eftir skúlatíð, er uml. 22% av fíggjarætlanini.

## Námsfrøðilig umsjón

Skúlaheimsassistentarnir eru lærarar á skúlanum, sum partvís røkja arbeiðið sum skúlaheimsassistentar. Vanliga hava assistentarnir 300 – 500 arb. tímar av norminum á skúlaheiminum. Teir eru settir eftir serligari lokalavtalu og starvslýsing, sum í stóran mun gongur út uppá at skapa trivnað, vera næmingunum til hjálpar og stuðla teimum í skúlagongdini og skipa fyri ella eggja næmingunum til ymiskt virksemi. Av meira praktiskum uppgávum skulu skúlaheimsassistentarnir útflýggja og móttaka lyklar, kanna um kømrini eru væl frágingin, tá næmingar flyta. Gera tað praktiska í samb. við aktivitetir, tilmelding, flutning o. a. Verða til hjálpar, tá skeið verða fyriskipað og vegleiða skeiðsluttakarar. Luttaka í fundum innan- og uttanhýsis í sambandi við skúlaheimið. Skúlaheimsassitentarnir eta altíð um kvøldið saman við næmingunum.
Rætt at búgva á skúlaheiminum hava næmingar, sum hava meira enn fimm korter at koyra til skúlan. Tó búgva nakrir næmingar á skúlaheiminum, sum búgva tættari við, eftir serligari avtalu. Hesir næmingar, ið sum oftast hava serligan tørv í sambandi við skúlagongdina og ofta hava hug at gevast, koma sum oftast væl frá skúlagongdini, júst tí teir búgva á skúlaheiminum.
Skúlaheimsassistenturin, Torben Sverre Jørgensen, sum eg tosaði við, kom við nøkrum áhugaverdum útsøgnum:

*Skúlarnir satsa ov litið uppá tað sosiala. Ein kanning vísir, at næmingar, sum búgva á skúlaheimi eru 10 – 20% betri nøgdir við skúlagongdina enn aðrir næmingar. Tað bendir á, at umhvørvið ger teir meiri búnar til undirvísing. Tann sosiali parturin hevur nógv størri týdning fyri tey ungu í útbúgving, enn tey flestu geva sær far um. Fleiri næmingar sakna kanska eina øksl at hella seg at, tá á stendur.*



*Fyrr vóru næmingar meira kollektivir og tóku lut í øllum aktivitetum, í dag eru teir meiri fyri seg sjálvar, og planleggja ikki fleiri dagar fram. Skal nakað henda, skal tað vera her og nú.*
*Tað eru fleiri næmingar, sum hava fingið eina betri tilveru og lívsgóðsku, og samstundis eina útbúgving, tí teir komu at búgva á skúlaheiminum.*

## Frítíðarítriv

Á skúlaheiminum eru innrættað fleiri rúm til nógv ymisk frítíðarítriv t. d. stórt og vælútgjørt fitnessrúm, tónleikarúm og rúm við billiard og borðtennis. Eisini eru fleiri uppihaldsrúm við sjónvarpi og billiard.







## Selandia - Center for Erhvervsrettet Uddannelse

Skúlin, sum er rættiliga stórur, hevur undirvísingarhøli 7 ymsataðni í býnum. Skúlin bjóðar fram 80 ymiskar útbúgvingar, lærlingaútbúgvingar (grundforløb og hovedforløb), gymnasialar útbúgvingar og akademiútbúgvingar. Skúlin hevur uml. 430 starvsfólk, og ársnæmingatalið er uml. 2900.

## Vitjan á Skúlaheiminum/Erhvervskollegiet, Kongsvingervej 1, Skive

### Innleiðing

Avtalað varð, at eg skuldi koma at vitja 25. – 28. apríl. Eg kom har um kvøldið og varð innkvarteraður á 4. hædd, sum vanligast verður nýtt til skeiðsluttakarar ella næmingar, sum búgva í eitt ella fleiri ár.
Avtalurnar við skúlaheimið og skúlan í Skive vórðu gjørdar í samráð við Christian Pedersen, Undervísingarleiðara, sum mangan hevur verið góður í ráðum í sambandi við vitjanir og onnur viðurskifti á Tekniskum skúlum í Danmark og serliga í Mið- og Norðurjyllandi.
Skúlaheimið er í løtuni skipað uttan ein fulltíðar skúlaheimsleiðara. Á skrivstovuni hjá skúlanum er ein "skúlaheimskoordinator", sum tekur sær av teimum praktisku viðurskiftunum í sambandi við tilmelding til skúlaheimið og samskiftinum við næmingarnar/búfólkini. Skúlaheimið er í einum bygningi í 4 hæddum, har kømrini eru og einum bygningi í einari hædd við kjallara, har móttøka og uppihaldsrúm eru í stovuhæddini og frítíðarrúm í kjallaranum. Skúlaheimið og skúlin liggja tætt saman á einum størri skúlaøki (Campus).



Tá eg vitjaði, var stórt umbyggingararbeiði í gongd. Øll kømur verða gjørd av nýggjum, so alt verður 1 manskømur við egnum baðirúmi. Eisini verða móttøkan, rúm hjá assistentunum og forhøllin moderniserað. Skúlaheimið kann hýsa uml. 160 fólkum.

### Starvsfólk



Í løtuni er skúlaheimið skipað við einum skúlaheimskoordinatori, trimum parttíðar skúlaheimsassistentum, pedelli og reingerðarfólkum. Skúlaheimið er mannað alt samdøgrið í vaktum. Skúlaheimsassistentarnir møta kl. 14.00 og eru á skúlaheiminum til morgunin eftir kl. 10.00. Tilkallivakt er í vikuskiftunum.
Skúlaheimsassistentarnir eru partvís í starvi á skúlaheiminum og partvís á skúlanum. Næmingarnir skulu sjálvir reingera kømrini, meðan reingerðarfólk reingera WC/bað einaferð um mánaðin.

## Matarskipan

Næmingarnir eta allar máltíðirnar í stóru kantinuni á skúlanum, tó verður kvøldkaffið serverað í forhøllini á skúlaheiminum. Á middegi er stór buffet við køldum og heitum rættum, og um kvøldið er natturði við viðskera og oftast ein flógvur rættur.



Á skúlaheiminum er ein tekøkur við uppihaldsrúmi á hvørjari hædd til næmingar og skeiðsluttakarar at nýta.
Næmingarnir nýta eitt elektroniskt kort til skráseting av máltíðum, til at keypa eitthvørt á skúlanum (góðgæti, pennar, bøkur), til autumatir og samstundis er kortið lykil til hurðarnar. Reiður peningur verður als ikki brúktur á skúlaheiminum ella skúlanum. Næmingarnir skulu sjálvir seta pengar inn á kortið í automatum, sum eru á skúlaheiminum og skúlanum.

## Skúlaheimsraksturin



Skúlaheimið hevur pláss fyri uml. 160 næmingum og skeiðsluttakarum. Í 2011 hevði skúlaheimið 98 ársnæmingar (Ársnæmingur = 1 næmingur í 40 vikur). Talið var nakað lágt orsakað av umbyggingum. Skúlaheimið verður fíggjað eftir taxameturháttinum við einum grundstudningi upp á kr. 450.000,- og kr. 55.700,- pr. ársnæming. (uml. kr. 60.300,-). Til námsfrøðiliga umsjón og aktivitetir á skúlaheiminum verður brúkt uml. 20% av samlaða stuðlinum pr. ársnæming. Næmingar við lærusáttmála og eru yvir 18 ár gjalda 480,- um vikuna. Næmingar undir 18 ár gjalda einki. Næmingar, sum búgva eftir serligari avtalu við myndugleikarnar, gjalda kr. 1.460,- um vikuna (frafaldstruede). Í løtuni búgva eisini 6 mexikanarar á skúlaheiminum. Hesir eru í starvi hjá Lego og fáa

útbúgving á skúlanum og starvsvenjing hjá Lego í Billund. Tá teir eru liðugt lærdir sum "værktøjsmagere", fara teir aftur til Mexico at starvast á verksmiðju hjá Lego í Mexico.

## Námsfrøðilig umsjón

Tveir av assistentunum, Kirsten Døhr Zobbe (myndin) og Bente Underbjerg, eru mentorar hjá næmingum, t.v.s. at tær taka hond um eitt ávíst tal av næmingum, sum tær skulu stuðla og vegleiða persónliga í sambandi við útbúgvingina. Hetta eru ofta næmingar, sum hava persónligar ella sosialar trupulleikar. Nakrir av hesum næmingum búgva á skúlaheiminum.



Eisini búgva nakrir "frafaldstruede" næmingar á skúlaheiminum eftir serligum reglum. Reglurnar fyri at kunna búgva á skúlaheiminum eru annars, at tú skalt hava minst 5 korters koyriveg til skúlan, og at ongin skúli við somu útbúgving liggur nærri bústaðnum/ læruplássinum.
Skúlaheimið hevur vaskirúm við vaskimaskinum og turkimaskinum, sum næmingarnir kunnu brúka, móti gjaldi.

## Frítíðarítriv

Skúlaheimsassistentarnir skipa fyri og eggja næmingunum at skipa fyri og luttaka í tiltøkum bæði innan- og uttanhýsis. Einaferð um mánaðin verður skipað fyri fundi, har allir næmingar møta, har skrá verður løgd fyri tiltøk, og har annars øll mál kunnu viðgerast.
Skúlaheimið hevur fleiri uppihalds- og aktivitetsrúm í kjallarahæddini. Har er stór sjónvarpsstova, rúm við billiard, borðtennis og fótbóltsspølum.
Eisini eru ymisk verkstøð (jarn, træ, leir- og málningalist), tónleikarúm og fitnessrúm.







## Skive Tekniske Skole

Hóast rákið á vinnuskúlaøkinum í Danmark seinnu árini hevur verið, at fleiri skúlar leggja saman (fusionera), hevur Skive Tekniske Skole megnað at havt nøktandi rakstur, so samanlegging ikki hevur verið fyri neyðini. Skúlin er í dag ein vælútbygdur, vælfungerandi skúli við nógvum útbúgvingartilboðum og nøkrum serútbúgvingum, sum einasti skúli í Danmark innan sítt øki, t.d. autosadelmager, gardindekoratør, møbelpolstrer og maskin- og møbilsnikkari.
Eg var saman við Christian Pedersen og hugdi runt á ymsu deildunum á skúlanum. Skúlin er vorðin ein snøggur skúli eftir nógvar um- og útbyggingar – seinast er nýggjur køkur gjørdur, sum veitir mat til fleiri aðrar skúlar í økinum.



# Vitjan á Skúlaheiminum, Blangstedsgårdsvej 1b, Odense
# (Munkeris Skolehjem og Kursushotel)

## Innleiðing

Avtalað varð, at eg skuldi koma á vitjan 18. – 20. apríl. Eg varð móttikin av Claus Trasbo, skúlsheimsleiðara, og heilsaði eg uppá tey starvsfólk, sum vóru til arbeiðis.
Skúlaheimið er í fleiri bygningum, tveir eldri og ein nýggjur (kursushotel), sum er samanbygdur við matarsalin og køkin. Skúlaheimið hevur fleiri skeiðshøli, sum skeiðsdeildin hjá skúlanum brúkar.



## Starvsfólk

Skúlaheimið er mannað alt samdøgrið.
Starvsfólkini eru skúlaheimsleiðari, ein fulltíðar skúlaheimsassistentur og tveir parttíðar skúlaheimsassistentar. Skrivstovufólk saman við skeiðsfyrisitingini. Í køkinum eru kokkur og 3 føst starvsfólk, harumframt eru nøkur til at taka, sum eisini gera reint, og onkur er í praktik.

## Matarskipan

Skúlaheimið hevur vælútgjørdan køk og rúmliga matstovu, sum matger til næmingarnar og tey, sum eru á skeiði.
Vanliga eta uml. 140 – 150 fólk, alt eftir hvussu nógvir skeiðsluttakarar eru.
Á hesum skúlaheiminum eta næmingarnir morgunmat og so heitan mat um kvøldið. Næmingarnir smyrja sjálvir ein matpakka umframt frukt og ¼ l. mjólk um morgunin, sum teir taka við og eta í kantinuni á deildini, har skúlagongdin er.




### Innrætting/útgerð í kømrunum:

Útgerðin er frá 3 ymiskum tíðarskeiðum.

Í elsta bygninginum eru kømrini innrættað til 2 persónar - sovisofur við goymsluryggleni, reolir á veggi.

Í mittasta bygn. er innrættað til 1 persón við sofu, skrivaraborði og reol í sama stíli, sum hjá okkum.

Í nýggjasta bygn. 2011 er innrætt. til 1 persón við boxmadrass, simplum skrivaraborðið (pláta, fest á veggin) og einfaldum stólum (bíligt, so tað kann skiftast eftir tørvi). Spariskipan til ljós – elektroniski lykilin (chips) verður settur í kontakt.

Næmingarnir hava sjálvir seingjaklæðir, handklæðir, dýnu og kodda við. Næm. kunnu keypa dýnu og kodda fyri kr. 100,- .

Næm. skulu sjálvir gera reint og halda kamarið ruddiligt – tað verður kontrollerað javnan. Tó verður kamari reinggjørt av reingerðarfólki, áðrenn nýggjur leiðari kemur inn.





## Skúlaheimsraksturin

Skúlaheimið hevur 148 sengur tøkar. Í elsta bygninginum eru 2 mans kømur, restin eru einakømur. Skúlaheimið fær sínar inntøkur frá taxameturtilskoti, nævingagjaldið og sølu av mati í sambandi við skeið og til deildir á skúlanum. Næmingar gjalda kr. 480,- um vikuna + kr. 25,- til internet og antennu. Skeiðsluttakarar gjalda nakað meir. Næmingar undir 18 ár gjalda onki og næmingar við uppihaldsskyldu gjalda heldur ikki.
Taxameturtilskotið er uml. kr. 60.000,- pr. ársnæming. Tær reellu intøkurnar og útreiðslurnar fyri skúlaheimið er ringt at lesa í fíggjarætlanini, tí skúlaheimið verður rikið saman við skúlaheiminum í Vejle, umframt at skúlaheimið umsitur fleiri úbúðarhús í Odense og Vejle.

## Námsfrøðilig umsjón/Frítíðarítriv

Á skúlaheiminum eru ein heiltíðar- og tveir parttíðarsettir skúlaheimsassistentar. Teir eru tøkir alt samdøgrið í vaktum, í vikuskiftum sum tilkallivakt.
Uppgávan hjá skúlaheimsassistentunum er at hava umsorgan fyri, at næmingarnir trívast á skúlaheiminum og at skipa fyri ymiskum tiltøkum og aktivitetum. Saman við einum búfólkaráði leggja assistentarnir eina skrá uml. 10 vikur fram. Aktivitetirnir eru t.d. fótbóltskapping, bingospæl, dartkapping, poolkapping, filmskvøld, spurnarkapping, orienteringsrenning. Eisini er "torsdagsbar", har møguleiki er hjá næmingum at keypa øl, cider o.a. undir skipaðum umstøðum. Á skúlaheiminum er einki fitnesssentur, men eitt super moderna sentur liggur beint við síðuna av, og har hevur skúlaheimið útvegað næmingunum sera lagaligar prísir.





## Syddansk erhvervsskole

Skúlin er ein stórur skúli við uml. 5000 næmingum við deildum ymsastaðni í Odense, umframt í Vejle og Grindsted. Saman við Claus Trasbo vitjaði eg partar av skúlanum hjá Syddansk Erhvervsskole í Odense.

## C-kostnaðarmeting

**Byggistig 1. Umvæling av 4 hædd á skúlaheiminum í Tórshavn**

| Pos. | Evni | | Upphædd | m2 |
|---|---|---|---|---|
| **1,0** | **Handverkara-útreiðslur** | | | |
| 1,1,0 | *Arbeiðstøku-sáttmálar* | | | |
| 1,1,1 | Bygnings arbeiðstøkur | | 3.600.000 | 450 |
| | | | 3.600.000 | |
| 1,2,0 | Ymiskt | | | |
| 1,2,1 | Rakstur av byggiplássi 1,5% av 1.1 | | 54.000 | |
| 1,2,2 | Prís & lønarvøkstur 2% p.á. av 1.1 | | 108.000 | |
| 1,2,3 | Óvæntað 10% av 1.1,1 | | 360.000 | |
| **1,3** | **Handverkara-útreiðslur íalt** | | **4.122.000** | |
| **2,0** | **Teknisk ráðgeving** | | | |
| 2,1 | Projekt av øllum (1. byggistig er pilotprojekt) | | 2.551.695 | |
| 2,2 | Projektuppfylging | | 74.196 | |
| 2,3 | Herav Projekt/umsiting av 1. byggistigi) | 494.640 | | |
| 2,4 | Byggileiðsla | | 61.830 | |
| 2,5 | Eftirlit | | 103.050 | |
| 2,6 | Útlegg 1% av 1.3 | | 41.220 | |
| **3,0** | **Leyst Inbúgv** | | | |
| 3,1 | Leyst innbúgv 5% av 1.3 | | 900.000 | |
| 3,2 | Umsiting av leysum innbúgvi % av 3.1 | | 72.000 | |
| 4,0 | Samlaðar útreiðslur | | **7.925.991** | |
| 5,0 | Trygging 0.4% av 1.3 | | 16.488 | |
| **6,0** | **Samlaður fíggjarkarmur** | | **7.942.479** | 17.650 |

## C-kostnaðarmeting

**Byggistig 2 Umvæling av 3 hædd á skúlaheiminum í Tórshavn**

| Pos. | Evni | Upphædd | m2 |
|---|---|---|---|
| **1,0** | **Handverkara-útreiðslur** | | |
| 1,1,0 | *Arbeiðstøku-sáttmálar* | | |
| 1,1,1 | Bygnings arbeiðstøkur | 3.600.000 | 450 |
| | | 3.600.000 | |
| 1,2,0 | Ymiskt | | |
| 1,2,1 | Rakstur av byggiplássi 1,5% av 1.1 | 54.000 | |
| 1,2,2 | Prís & lønarvøkstur 2% p.á. av 1.1 | 216.000 | |
| 1,2,3 | Óvæntað 10% av 1.1,1 | 360.000 | |
| **1,3** | **Handverkara-útreiðslur íalt** | **4.230.000** | |
| **2,0** | **Teknisk ráðgeving** | | |
| 2,1 | Projektuppfylling | 76.551 | |
| 2,2 | Byggileiðsla | 63.450 | |
| 2,3 | Eftirlit | 105.750 | |
| 2,4 | Útlegg 1% av 1.3 | 42.300 | |
| **3,0** | **Leyst Inbúgv** | | |
| 3,1 | Leyst innbúgv 5% av 1.3 | 900.000 | |
| 3,2 | Umsiting av leysum innbúgvi % av 3.1 | 72.000 | |
| 4,0 | Samlaðar útreiðslur | **5.490.051** | |
| | Kommunu - MVG. | 0 | |
| 5,0 | Trygging 0.4% av 1.3 | 16.920 | |
| **6,0** | **Samlaður fíggjarkarmur** | **5.506.971** | 12.238 |

## C-kostnaðarmeting

**Umvæling av hædd 2 á skúlaheiminum í Tórshavn**

| Pos. | Evni | Upphædd | m2 |
|---|---|---|---|
| **1,0** | **Handverkara-útreiðslur** | | |
| 1,1,0 | *Arbeiðstøku-sáttmálar* | | |
| 1,1,1 | Bygnings arbeiðstøkur | 3.600.000 | 450 |
| | | 3.600.000 | |
| 1,2,0 | Ymiskt | | |
| 1,2,1 | Rakstur av byggiplássi 3% av 1.1 | 108.000 | |
| 1,2,2 | Prís & lønarvøkstur 3% p.á. av 1.1 | 324.000 | |
| 1,2,3 | Óvæntað 10% av 1.1,1 | 360.000 | |
| **1,3** | **Handverkara-útreiðslur íalt** | **4.392.000** | |
| **2,0** | **Teknisk ráðgeving** | | |
| 2,1 | Projektuppfylling | 76.551 | |
| 2,2 | Byggileiðsla | 65.880 | |
| 2,3 | Eftirlit | 109.800 | |
| 2,4 | Útlegg 1% av 1.3 | 43.920 | |
| **3,0** | **Leyst Inbúgv** | | |
| 3,1 | Leyst innbúgv 5% av 1.3 | 900.000 | |
| 3,2 | Umsiting av leysum innbúgvi % av 3.1 | 72.000 | |
| 4,0 | Samlaðar útreiðslur | **5.660.151** | |
| 5,0 | Trygging 0.4% av 1.3 | 17.568 | |
| **6,0** | **Samlaður fíggjarkarmur** | **5.677.719** | |

## C-kostnaðarmeting

**Byggistig 4. Umvæling av 1 hædd á skúlaheiminum í Tórshavn**

| Pos. | Evni | Upphædd | m2 |
|---|---|---|---|
| **1,0** | **Handverkara-útreiðslur** | | |
| 1,1,0 | *Arbeiðstøku-sáttmálar* | | |
| 1,1,1 | Bygnings arbeiðstøkur | 4.900.000 | 700 |
| | | 4.900.000 | |
| 1,2,0 | Ymiskt | | |
| 1,2,1 | Rakstur av byggiplássi 1,5% av 1.1 | 73.500 | |
| 1,2,2 | Prís & lønarvøkstur 3% p.á. av 1.1 | 392.000 | |
| 1,2,3 | Óvæntað 10% av 1.1,1 | 490.000 | |
| **1,3** | **Handverkara-útreiðslur íalt** | **5.855.500** | |
| **2,0** | **Teknisk ráðgeving** | | |
| 2,1 | Projektuppfylling | 76.551 | |
| 2,2 | Byggileiðsla | 87.833 | |
| 2,3 | Eftirlit | 146.388 | |
| 2,4 | Útlegg 1% av 1.3 | 58.555 | |
| **3,0** | **Leyst Inbúgv** | | |
| 3,1 | Leyst innbúgv 5% av 1.3 | 1.400.000 | |
| 3,2 | Umsiting av leysum innbúgvi % av 3.1 | 112.000 | |
| 4,0 | Samlaðar útreiðslur | **7.736.826** | |
| 5,0 | Trygging 0.4% av 1.3 | 23.422 | |
| **7,0** | **Samlaður fíggjarkarmur** | **7.760.248** | 11.086 |

## C-kostnaðarmeting

**Byggistig 4. Umvæling av 1 hædd á skúlaheiminum í Tórshavn**

| Pos. | Evni | Upphædd | m2 |
|---|---|---|---|
| **1,0** | **Handverkara-útreiðslur** | | |
| 1,1,0 | *Arbeiðstøku-sáttmálar* | | |
| 1,1,1 | Bygnings arbeiðstøkur | 2.275.000 | 350 |
| | | 2.275.000 | |
| 1,2,0 | Ymiskt | | |
| 1,2,1 | Rakstur av byggiplássi 1,5% av 1.1 | 34.125 | |
| 1,2,2 | Prís & lønarvøkstur 3% p.á. av 1.1 | 182.000 | |
| 1,2,3 | Óvæntað 10% av 1.1,1 | 227.500 | |
| **1,3** | **Handverkara-útreiðslur íalt** | **2.718.625** | |
| **2,0** | **Teknisk ráðgeving** | | |
| 2,1 | Projektuppfylling | 76.551 | |
| 2,2 | Byggileiðsla | 40.779 | |
| 2,3 | Eftirlit | 67.966 | |
| 2,4 | Útlegg 1% av 1.3 | 27.186 | |
| **3,0** | **Leyst Inbúgv** | | |
| 3,1 | Leyst innbúgv 5% av 1.3 | 700.000 | |
| 3,2 | Umsiting av leysum innbúgvi % av 3.1 | 56.000 | |
| 4,0 | Samlaðar útreiðslur | **3.687.107** | |
| 5,0 | Trygging 0.4% av 1.3 | 10.875 | |
| **7,0** | **Samlaður fíggjarkarmur** | **3.697.982** | 10.566 |

## C-kostnaðarmeting (m2-yvirslag)

**Umvæling av skúlaheiminum á Tekniska Skúla í Tórshavn**

| Pos. | Evni | Kr. | m2 |
|---|---|---|---|
| **1,0** | **Handverkara-útreiðslur** | | |
| 1,1,0 | BS5 0. hædd (kjallari) | 2.275.000 | 350 |
| 1,1,1 | BS4 1. hædd | 4.900.000 | 700 |
| 1,1,2 | BS3 2. hædd | 3.600.000 | 450 |
| 1,1,3 | BS2 3. hædd | 3.600.000 | 450 |
| 1,1,4 | BS1 4. hædd | 3.600.000 | 450 |
| 1,1 | | 17.975.000 | |
| 1,2,0 | Ymiskt | | |
| 1,2,1 | Rakstur av byggiplássi % av 1.1 | 269.625 | |
| 1,2,2 | Prís & lønarvøkstur | 1.222.000 | |
| 1,2,3 | Óvæntað % av 1,1 | 1.797.500 | |
| **1,3** | **Handverkara-útreiðslur íalt** | **21.264.125** | |
| **2,0** | **Teknisk ráðgeving** | | |
| 2,1 | Projektering | 2.168.941 | |
| 2,2 | Projektuppfylging | 382.754 | |
| 2,3 | Eftirlit % av 2,1 | 637.924 | |
| 2,2 | Byggileiðsla % av 2,1 + 2,3 | 255.170 | |
| **3,0** | **Leyst Inbúgv** | | |
| 3,1 | Leyst innbúgv samb. útrokningar viðv. einstøku hæddunum | 4.800.000 | |
| 3,2 | Umsiting av leysum innbúgvi | 384.000 | |
| **4,0** | Samlaðar útreiðslur | **32.444.608** | |
| **5,0** | Útlegg % av 1.3 | 212.641 | |
| **6,0** | Trygging % av 1.3 | 85.057 | |
| **7,0** | **Samlaður fíggjarkarmur** | **32.742.306** | |


503
KAMAR
12M2
504
KAMAR
12M2
WC
2,2M2
GONG
3,2M2
BAD
2,6M2
Inspektionshurd
GONG
52,2M2
1000
1600
395
1705
1754
1425
2600
80
100
75


SKAP
HATTAHYLL
SKOGVAHYLL
SKAP





